VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn, seinnapartin stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig – um kvøldið kaldari.



Veðrið leygardagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið sunnudagin:
Fyrrapartin lot av ymsum ættum, men seinnapartin veksur hann vindin til hvassan vind av útnyrðingi og kavaælingur. Hitalagið millum frostmarkið og ÷3 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Mánadagin upp í skrið av útnyrðingi, týsdagin eitt sindur minni vindur. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum ÷1 og ÷5 stig.

Rannsóknarskip á rundferð

Magnus Heinason, havrannsóknarskip, er í hesum døgum á ferð kring oyggjarnar fyri at upplýsa um virksemið umborð. Í 20 ár hevur skipið gjørt kanningar kring Føroyar. Mikudagin vitjaði Magnus Heinason á Vági og á Tvøroyri

FISKIFRØÐI
Dagfinn Olsen

Hóast Magnus Heinason er bygdur í Noreg í 1978 sum saltfiskatrolari, so er hann ikki nakað vanligt fiskifar. Og tað hevur hann ikki verið í 20 ár. Í 1982 gjørdist Magnus Heinason havrannsóknarskip og sostatt eru nú 20 ár síðani, at Fiskirannsóknarstovan fór undir kanningar kring Føroyar.

Runda árstalið er ein orsøk til, at skipið nú er á kunningarferð kring oyggjarnar, tí nógv vitan um havið kring okkum er savnað hesi 20 árini, og tað vilja tey umborð á havrannsóknarskipinum sleppa at siga skúlanæmingum og almenninginum eitt sindur um.

Siglt verð ur kring oyggjarnar og næmingar úr framhaldsdeildunum í fólkaskúlanum eru bodnir umborð og á kvøldið er vanliga fyrilestur, har øll áhugað eru vælkomin.

Mikumorgunin vitjaði Magnus Heinason á Vági og framhaldsdeildarnæmingar vitjaðu umborð allan fyrrapartin. Greitt var frá um tað, ið fyriferst umborð, eins og útgerð av ymsum slag var at síggja. Ferðin umborð var skipað í eini 8 ymisk økir, har fólk greiddi frá, júst hvat gekk fyri seg á tí staðnum umborð ella hvørjar kanningar fóru fram har. Mong tól og fiskasløg vóru at síggja. M.a. eitt modell av einum troli, so tað sást, hvusu eitt slíkt virkar.

Seinnapartin fór Magnus Heinason á Tvøroyri, har framhaldsdeildarnæmingar vitjaðu umborð og seinni á kvøldi stóð fyrilestur á skránni, áðrenn skipið setti kós norðureftir.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷7
Nuuk	–
Qaqortoq	8
Ammassalik	÷5
Saint John's	÷3
Halifax	÷6
Reykjavík	2
Seyðisfjørður	÷4
Tórshavn	÷1
Lerwick	1
Aberdeen	3
London	6
Tromsø	÷10
Bergen	1
Oslo	–
Stokkhólm	÷4
Keypmannah.	1
Helsinki	÷14
Moskva	0
Berlin	2
Warzawa	2
Kiev	0
Bukarest	1
Paris	4
Madrid	8
Róm	12
Malorca	13
Athen	16
Malta	15
Tunis	13
Beijing	0
New Dehli	17
Bangkok	31
Jakarta	30
Sydney	–
New York	÷1
Miami	21
Los Angeles	15
Meksikobýur	17
Panama	33
La Paz	5
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	12

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt hátrýst, 1047 hPa á 44N-24V fer spakuliga í útsynning. Ein hátrýstryggur haðani til Íslands verður yvir Føroyum frýggjanáttina.

Lágtrýstið norðan fyri Ísland fer í landnyrðing, meðan lágtrýstið við Hvarvið fer eysturefter. Hesi lágtrýst draga kalda luft móti Føroyum í vikuskiftinum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 29/01 kl. 06⁰⁰– 30/01 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷2,6°
Minsti hiti máldur í jan.: ÷8,8° Mesti hiti máldur í jan.: 11,6°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,1 mm – mált frá 29/01 kl. 06⁰⁰–30/01 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í januar: 201,3 mm

Spf.
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
HESTPRENT
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

VESTFALLSKYRRINDI

23. jan.: Mánin næstur jørðini
25. jan.: Seinna kvarter
1. febr.: Tendring
7. febr.: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
31. jan	05.44	18.22	04.44	17.22	04.59	17.37	07.44	20.22	08.44	21.22	03.59	16.37	02.59	15.37	05.59	18.37	06.59	19.37	05.29	18.07	06.44	19.22
1. feb	06.38	19.04	05.38	18.04	05.53	18.19	08.38	21.04	09.38	22.04	04.53	17.19	03.53	16.19	06.53	19.19	07.53	20.19	06.23	18.49	07.38	20.04
2. feb	07.28	19.52	06.28	18.52	06.43	19.07	09.28	21.52	10.28	22.52	05.43	18.07	04.43	17.07	07.43	20.07	08.43	21.07	07.13	19.37	08.28	20.52
3. feb	08.14	20.36	07.14	19.36	07.29	19.51	10.14	22.36	11.14	23.36	06.29	18.51	05.29	17.51	08.29	20.51	09.29	21.51	07.59	20.21	09.14	21.36

5 707265 100050 >